# Nýggjur stjóri í Smyril Line

**49 ára gamli Jan Walle úr Norra verður nýggjur stjóri í Smyril Line í fyribils eitt ár. Jan Walle er útbúgvin siviløkonomur og hevur meira enn 20 ára royndir innan reiðaríivirksemi og shippingfyritøkur, har hann meginpartin av tíðini hevur verið í stjórastørvum og øðrum leiðandi størvum**

STJÓRI
*tíðindaskriv frá Smyril Line*

Nýggi stjórin í Smyril Line, Jan Walle, ið tekur við 1. apríl, hevur drúgvar royndir innan reiðaríivirksemi og shippingfyritøkur, har hansara yrkisleið hevur verið síðani 1983. Hann avloysir Óla Hammer, sum tók stig til at stovna Smyril Line í 1982, og sum hevur verið stjóri síðani. Óli Hammer boðaði stutt fyri páskir frá, at hann leggur frá sær.

Jan Walle hevur sáttmála við Smyril Line í fyribils eitt ár við møguleika at leingja sáttmálan. Hansara høvuðsuppgáva verður at økja ferðafólkatalið um borð á Norrönu, finna nýggjar marknaðir og nýggjar samstarvsmøguleikar.

- Eg skal taka tað besta burtur úr felagnum og arbeiða við tíð. Ferðafólkamarknaðurin er stórur, og vit skulu hava fleiri ferðafólk við miðvísari marknaðarførslu, sum røkkir okkara málbólkum í Norðurlondum, Evropa og aðrastaðni kring heimin. Ein týdningarmikil liður í hesi tilgongdini verður at finna nýggjar marknaðir og nýggjar samstarvsfelagar, sigur Jan Walle.



Hann er úr Norra, 49 ár, útbúgvin siviløkonomur og hevur havt fleiri stjórastørv og onnur leiðandi størv í reiðaríum og shippingfyritøkum.

### Altjóða royndir

Jan Walle varð settur í starv sum EDV-leiðari í Kosmos ASA í Norra í 1983. Í 1986 gjørdist hann búskaparstjóri fyri Kosmos ASA Internationale Shipping Division. Frá 1988 til 1999 var Jan Walle fyrisitandi stjóri í Bastøfergen AS, sum er eitt norskt reiðarí, ið rekur innanríkis ferjurutur.

Í 1990 bleiv Jan Walle stjóri fyri handilsmenningini í Color Line ASA, sum keypti Fred Olsen Lines sama ár. Jan Walle hevði ábyrgdina av keypinum. Talan var um eina íløgu upp á 1,3 milliardir krónur, og eftir keypið gjørdist hann rutustjóri fyri rutuni millum Kristiansand og Hirtshals. Í 1997 tók Jan Walle við sum búskapar- og fíggjarstjóri í Color Line, og samstundis bleiv hann varamaður hjá fyrisitandi stjóranum.

Í 1998 flutti Jan Walle til USA, har hann fór í starv sum Chief Operating Officer í felagnum Premier Cruise í Miami, sum hevur seks cruise skip og 4.000 fólk í starvi. Hansara høvuðsuppgáva var at umskipa felagið.

Frá 1999 til 2002 arbeiddi Jan Walle fyri altjóða flutnings- og logistikfelagið, Wallenius Wilhelmsen Lines AS. Fyritøkan flytir nýggjar bilar av verksmiðjunum út á marknaðirnar, og hon hevur ein árligan umsetning upp á 12 milliardir krónur. 3.000 fólk starvast hjá Wallenius Wilhelmsen Lines AS, sum hevur umboðan í 60 londum.

Frá 2003 til 2004 var Jan Walle stjóri í Kystlink AS, har Norsk Hydro er størsti partaeigari. Í 2004 varð hann biðin at vera ráðgevi, tá Fjord Line og Smyril Line kannaðu møguleikarnar fyri samstarvi í einum nýggjum felagi. Ætlanirnar vórðu kortini lagdar til viks, men feløgini eru framvegis opin fyri øðrum samstarvsmøguleikum.

Nýggi stjórin í Smyril Line, sum er giftur og hevur tvey vaksin børn, hevur sostatt nógvar royndir í viðførinum, og tað er nevndin í Smyril Line sera væl nøgd við.

- Vit hava funnið rætta persónin at leiða Smyril Line inn í framtíðina, eftir at vit í trý ár hava verið í einum hørðum byrjunarskeiði við nýggju Norrönu, sigur Klæmint Weihe, nevndarformaður í Smyril Line.

## Umbering

Vísandi til lýsing í Sosialinum »Ferðast frítt til Kreta« í gjár, vil eg við hesum koma við eini treytaleysari umbering, fyri at eg havi sett lýsingina í.

Lýsingin var meint sum ein apríl søga, og eg væntaði ikki at hon fór at verða tikin illa upp.

Orsakað, vónandi verður hetta mær fyrigivið

**Jóhan á Plógv**

# Eivør á topp 15

**Eivør Pálsdóttir er framvegis væl umtókt í Íslandi og hesa vikuna hevur hon tvær fløgur á topp 15 listanum og tað hendir ikki ofta, at sama tónlistafólk megnar hetta**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hea vikuna hevur Eivør Pálsdóttir tvær fløgur á topp 15 listanum í Íslandi. Heimildarmaður okkara í Íslandi, Jens Guð, sigur seg ikki minnast, at tað er hent áður, at sama tónlistafólk hevur tvær fløgur á listanum samstundis.

Nýggja fløgan, Trøllabundin, ið hon hevur innspælt við DR Big Band, er nummar 6 á listanum og fløgan Eivør er nummar 15. Trøllabundin hevur eftir øllum at døma av nýggjum varpað ljós á fløguna Eivør, sum er komin á 15 pláss av 21 plássi.

Fløgan Eivør hevur verið á topp 30 í 17 vikur.

- Hon er ein superstjørna í Íslandi, ein av teim størstu, sigur heimildarmaður okkara um Eivør.

Bólkurin Yggdrasil, sum Eivør eisini syngur við av og á, vitjar í Íslandi 8. juni, men á ferðini er Kári Sverrison sangari. Bólkurin hevur selt fløgur í hundraðtali í Íslandi.